

West Hercules borar her á føroyska landgrunninum. Sum skilst hevur verið av besta veðri tíðina borað hevur verið.
Mynd Heini Havn Magnussen

# Oljuboringin á føroyska landgrunninum gongur sum ætlað

Deil:

**Jan Müller**

28.07.2014 - 14:10

Oljan.fo

Í dag, ólavsøkuaftan, er júst ein mánaði síðani, at pallurin West Hercules setti á at bora seinna brunnin á føroyska landgrunninum í ár.

“Boringin gongur sum ætlað,” er tað einasta vit fáa Rúna M. Hansen, stjóra í Statoil, sum stendur fyri boringini, at siga.

Einki verður at frætta um úrslitið, fyrr enn boringin er heilt liðug seinni í august mánað.

Boringin á Súla Stelkur leitimiðinum tætt upp at markinum til Bretlands er seinni brunnurin, sum Statoil stendur á odda fyri í ár. Hin brunnurin Brudan 2 rakti ikki við olju ella gass.

Hóast sannlíkið fyri at gera eitt lønandi fund á føroyska landgrunninum ikki er stórt, eitt nú tí tað er ikki so lætt við seismikki at síggja, hvat er undir basaltinum, so hava metingarnar fyri henda seinna brunnin verið meira jaligar, tí borað verður tætt við eitt økið hinumegin markið, har stórt oljufund er gjørt.

Tá boringin av Súla Stelkur er liðug kemur boripallurin inn á Skálafjørðin at verða umvældur, áðrenn kósin verður sett móti New Foundlandi. Har skal West Hercules bora fyri Statoil komandi árini.